# Átrokandi neyðhjálp er óbrúkt

**Tað var so átrokandi neyðugt at fáa til vega pengar til neyðhjálp til tsunami-offrini í Asia, at løgmaður í skundi fekk pengarnar við fíggjarnevndarskjali. Hetta var fyri meira enn sjey mánaðum síðani, men enn er ikki eitt oyra av teimum trimum milliónunum brúkt. Løgtingsmaður krevur nú eina frágreiðing frá løgmanni um málið**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað hava verið fleiri 50 løgtingsfundir, síðani løgmaður í skundi bað um at fáa tríggjar milliónir krónur, so at tey neyðstøddu eftir flóðalduna í Indiska havinum kundu fáa hjálp sum skjótast.

Pengarnir vóru játtaðir av fíggjarnevndini sama dag, sum løgmaður bað um teir, men nú sjey mánaðir seinni er ikki eitt oyra av teimum trimum milliónunum brúkt.

Løgtingsmaðurin Kári P. Højgaard hevur tí sett løgmanni ein skrivligan fyrispurning í løgtinginum, har hann biður um eina frágreiðing um málið.

– Hví er ein eykajáttan áljóðandi 3 mió. kr meira enn 7 mánaðar eftir umbønina ikki nýtt til endamálið, tá hendan varð fingin til vega við einum fíggjarnevndarskjali við teirri grundgeving, at málið hevur skund, spyr Kári P. Højgaard millum annað.

## Fekk tríggjar milliónir

Tað var tann 5. januar í ár, at Jóannes Eidesgaard, løgmaður, bað fíggjarnevndina um at játta tríggjar milliónir krónur til átrokandi neyðhjálp. Pengarnir skuldu nýtast til at hjálpa í kreppuraktu økjunum í suður- og landsyningspartinum av Asia, eftir at hervilig flóðalda rakti strandalondini í Indiska havinum.

– Málið hevur skund, og tað ikki er ráðiligt at bíða, til Løgtingið kemur saman aftur, segði løgmaður í umbønini.

Fíggjarnevndin helt eisini, at málið hevði skund, og játtaði sama dag pengarnar til neyðhjálpina.



*Føroyar vildu eisini hjálpa til, tá ið flóðalda rakti Asia, men almennu pengarnir, sum vórðu játtaðir í skundi, eru ikki brúktir enn*



*Kári P. Højgaard spyr, hví pengarnir til neyðhjálp í Asia ikki eru brúktir*



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, bað 5. januar um tríggjar milliónir krónur til neyðhjálp og fekk tær*

## Vil hava frágreiðing

Men nú – meira enn sjey mánaðir og 50 løgtingsfundir seinni – eru pengarnir framvegis ikki brúktir, og hetta hevur fingið løgtingsmannin Kára P. Højgaard at undrast.

– Tað hava gingið søgur um, at nógv av tí lovaðu neyðhjálpini til tey kreppuraktu økini ongantíð kom fram. At Føroyar skuldu verða eitt av teimum londunum, sum lovaðu at senda neyðhjálp, men ikki gjørdu tað, tykist svárt at skilja, sigur hann.

– Her má finnast ein sera góð frágreiðing og tí er tað, at eg sum fíggjarnevnd-arlimur seti hendan spurningin.

Jóannes Eidesgaard segði mánamorgunin, at hann fór at hyggja eftir málinum, og at hann ikki kundi siga nakað, fyrr enn hann hevði gjørt tað.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá løgmanni áðrenn evstamark í gjár.

# Løgmaður sleppur at svara fyri seg

**Á løgtingsfundinum í dag skal atkvøðast um fýra skrivligar fyrispurningar, sum allir eru til løgmann**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Størsti andstøðuflokkurin í løgtinginum hevur nógvar spurningar til løgmann um aktuell politisk viðurskifti, og á løgtingsfundi í dag skulu tingfólk atkvøða um fýra fyrispurningar til Jóannes Eidesgaard frá tingfólki hjá Tjóðveldisflokkinum.

Torbjørn Jacobsen hevur sett løgmanni nakrar spurningar í sambandi við málið um Jøkulfell. Torbjørn Jacobsen vil millum annað hava at vita, hvat løgmaður visti nær um málið, og um hann heldur handfaringina av málinum verða nóg góða.

Annita á Fríðriksmørk spyr um setanina av leiðara fyri frítíðarskúlan á Tvøroyri, sum var eitt heitt politiskt mál herfyri. Annita á Fríðriksmørk spyr løgmann, um hann hevur røkt – og havt møguleika at røkja – sína eftirlitsskyldu í málinum.

## Tveir frá Høgna

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, hevur sett løgmanni tveir skrivligar fyrispurningar.

Annar er um Føroyar og EFTA, og hin fyrispurningurin er um sjálvstøðugan føroyskan limaskap í norðurlendskum samstarvi.

Høgni Hoydal spyr millum annað løgmann, um hann gav rættar upplýsingar, tá ið hann segði við Útvarpið, at danska stjórnin hevur sent einmæltu umsókn føroyinga um limaskap víðari til Norðurlandaráðið, men at undirtøka fekst ikki fyri henni millum hini Norðurlondini.

Tingið skal seinnapartin týsdagin gera av, um fyrispurningarnir skulu svarast.

## Makrel ger nýggja fløgu

Seinastu tíðina hevur MTV-aktuelli rockbólkurin Makrel verið í Noregi. Har spældi bólkurin á Storåsfestivalinum og hevði tvær live-framførslur í Tróndheimi. Umframt alt hetta vóru upptøkur eisini gjørdar til eina nýggja fløgu við bólkinum.

– Vit megnaðu at gera allar upptøkurnar, sum vit høvdu sett okkum fyri, áðrenn vit fóru í studio. So okkara triðja fløga er á veg, og vit vóna, at hon verður ein fragd at hoyra, sigur bólkurin á heimasíðu sínari.

Útgávudagurin er ikki ásettur enn, men nú skal bólkurin gera seinasta partin av tónleikinum lidnan. Og meðan alt tað verður gjørt, er Makrel við í MTV-kappingini Nordic Unsigned, har tað framvegis ber til at atkvøða fyri teimum. Makrel liggur í løtuni á odda í kappingini, men atkvøðugreiðslan heldur fram hesa vikuna.

## Barsskor siglir gamla farleið

Um vikuskiftið verður sjómannadagur í Klaksvík, og nógv tiltøk við tilknýti sjógvin og fiskiskap verða á skránni. Ein tiltak í sambandi við dagin verður, at gamla strandfaraskipið Barsskor fer at taka upp aftur farleiðina tvørtur um vágna í Klaksvík.

Fyri nógvum árum síðani var ferja, sum sigdi millum eystaru og vestaru síðu av Klaksvík, og øll tey, sum eru ov ung til at hava upplivað hetta, kunnu fáa ein smakk av farleiðini leygardagin.

Barsskor fer at sigla av Stongunum og yvir á kaiina niðanfyri Skipafelagið. Tríggir túrar verða sigldir, og kostnaðurin fyri ferðaseðilin verður tann sami, sum tá ið siglt var seinasta – nevniliga 25 oyru.

Barsskor fer at sigla av Stongunum kl. 9.30, 14.30 og 17.00, og eitt korter seinni siglir Barsskor frá vestara kaiøki.